# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Renate Simonsen 70 ár



22. november 2005 fylti Renate Simonsen í Hoyvík 70 ár.

Renate, ið er ættað úr Sveits, hevur búð í Føroyum síðan 1966.

Tá vit høvdu samrøðu við Renate í august segði hon, at fyrstu 18 árini í Føroyum atbeiddi hon á Ferðamannastovuni.

Í 1984 stovnaðu hon og maðurin, Sigurd Simonsen, ferðaskrivstovuna Faroe Swiss Travel Centre, og í 1988 var hon við til at stovna Faroe Travel, har Renate framvegis starvast.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Julian Jespersen,** Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mánadagin, 79 ára gamal. Farið verður úr kapellinum hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13 úr Tvøroyrar kirkju. Sungið veðrur úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Julian, kunnu lata Sambýlinum á Tvøroyri eina gávu. Konto í Føroya Banka.

**Sjúrður Jóhann-Hendrikson Poulsen,** ættaður úr Skopun, búsitandi í Reykjavík í Íslandi andaðist sunnudagin 20. november, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Gravavogskirkju í Reykjavík mánadagin klokkan 13.

## Tøkk

Øllum tykkum sum á ymiskan hátt vístu samkenslu,
tá ið okkara kæra mamma, omma, langomma
og olduromma

**Anna Elisabeth Justinussen**
vanliga nevnd Betta við Stein

doyði og varð jarðað, senda vit okkara hjartans tøkk.

Ein serstøk tøkk til Ellis- og røktarheimið í Runavík
ið vóru so væl um hana.
Hjartans tøkk til tykkum ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Brynhild, Dagny og Birgerð**

### Dagurin í morgin

**24. november. Chrysogonos**, deyður umleið ár 300. Halgisøgurnar siga, at hann var kristin einbúgvi, sum varð tikin av døgum meðan Diocletianus var keisari.

## Ása Olsen 50



Leygardagin 26. november fyllir Ása Olsen í Havn 50 ár. Ása er best kend sum formaðurin í Heilsuhjálparafelag Føroya, har hon er leiðari fyri umleið 500 heilsuhjálparum. Ása, ið er ættað úr Øravík, arbeiddi í nógv ár sum bókhaldari fyri ymsar fyritøkur í suðri og í Havn. Eisini hevur hon arbeitt eitt skifti innan flakavinnuna á Tvøroyri, somuleiðis hevur hon roynt seg sum vikarur í skúlanum í Hovi. Annars hevur hon eisini arbeitt í handli, og verið heimahjálp. Síðan 1996 hevur hon verið formaður í heilsuhjálparafelag Føroya. Undir hennara leiðslu er felagið rættuliga nógv ment frá tí at heimahjálpirnar vóru ófaklærdar til nú tær hava fingið sín egna fak-identitet við at vera uppskúlaðar til heilsuhjálparar. Hesa útbúgving hava nógvar heimahjálparar havt møguleika til at nema sær við tað, at tær hava kunna fingið løn undir uppskúling. Eisini eitt stórt átak í tíðini hjá Ásu er, at allir limirnir hava fingið eftirløn umframt nógvar batar í arbeiðsviðurskiftunum. Ása er sera arbeiðssom, og hon møtir altíð væl fyrireikað til fundir o.a. Foreldrini hjá Ásu vóru: Óli Olsen (f.1928) uppvaksin í Froðba og Sonja Olsen, f. Bech, fødd á Tvøroyri í 1929, men uppvaksin í Vestmanna. Sonja doyði á ungum árum í 1974, 45 ára gomul, og Óli doyði í 1990, 62 ára gamal. Børnini vóru 9 í tali, og var Ása, einasta systirin og nummar 5 í røðini. Ása eigur fýra eldri og fýra yngri brøður. Børnini hjá Ásu eru: tvíburarnir Sonni og Tummas Djurhuus 31 ár, Elin Sjóstein 28 ár og Christian Djurhuus 25 ár. Harumframt eigur hon ommubørnini: Sólrún, Rebekka, Ása Elisabeth, Esther Maria og Benjamin. Ása var í nógv ár virkin í leiðsluni í Sjálvsstýrisflokkinum, har hon bæði var forkvinna í flokkinum í Suðurstreymoy og í landsnevndini hjá Sjálvstýrisflokkinum. Føðingardagin, tann 26. november, verður opið hús á Berjabrekku 193 frá kl. 12-16 har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Kyndil sóknast eftir hondbóltsmyndum



*Eitt av teimum mongu FM-heitunum í fremstu røð er komið í hús. Myndin er tikin í høllini á Hálsi á vári 1974. Aftara rað f.v.: Heðin Mikkelsen, Finnur Helmsdal, Anfinn Rubek Nielsen, Jóan Pætur Midjord og Niels Nattestad.*
*Fremra rað f.v.: Sverri Jacobsen, Áki Davidsen, Jakku Heinesen, Jørleif Kúrberg, Hendrik Rubeksen og Hilmar Joensen*

**Ítróttartíðindamaðurin Suni Merkistein skrivar í løtuni søguna hjá hondbóltsfelagnum Kyndli, sum hevur fimti ár á baki næsta ár. Ætlandi kemur bókin út 18. mai 2006**

Tíðindaskriv

Skal eitt gott heildarúrslit spyrjast burturúr, er neyðugt at fáa til vega áhugaverdar myndir at prýða bókina við.

Tí leitar felagið eftir myndum frá hondbóltsdystum á bygd og í bý, kanska serliga frá 1960 og 1970 árunum. Aðrar myndir, frá útferðum, vitjanum og ymiskum, ið hevur myndað felagslívið, eru eisini vælkomnar. Nýggjari myndir hava eisini áhuga. Til ber at venda sær til Høgna Vilhelmsen á telefon 274344

**Bók, fløga og veitsla**

Hondbóltsfelagið Kyndil er stovnað 10. mars 1956 og hevur felagið á fleiri økjum gjørt vart við seg hesi 50 árini.

Nevndin hevur tí gjørt av, at søga felagsins skal gevast út í stórsligna bók, sum Suni Merkistein skrivar. Av tí at hagtøl felagsins eru so neyv, verður bókin uttan iva ein varði í føroyskari hondbóltssøgu til gagns fyri fleiri feløg.

Men bókaútgáva er bert eitt tiltak. Felagið letur eisini gera eina fløgu við hondbóltssangum. Harafturat verður skipað fyri steypakappingum, og sjálvur stovningardagurin verður hátíðarhildin við stórari veitslu 11. mars 2006.